**VESTLAX** OG **VESTSALMON** ERU ÁVIKAVIST MÓÐUR- OG DÓTTURFELØG. VIT KLEKJA ROGN OG FRAMLEIÐA SMOLT OG SMÁSÍL. VIT ALA LAKS OG SÍL Á SJÓNUM. VIT SLAKTA OG HAGREIÐA EGNAN EINS OG ANNAN FISK. Á SØLUDEILDINI MARKNAÐARFØRA OG SELJA VIT EGNAN FISK OG SELJA FISK FYRI AÐRAR. VIT ERU UMLEIÐ 110 STARVSFÓLK Í FELAGNUM.



sansir.fo

# VIRKISLEIÐARI TIL VESTSALMON

**Vit sóknast eftir einum dugnaligum virkisleiðara til hagreiðingarvirkið á bryggjuni í Kollafirði.**

Virksemi okkara er í stórum vøkstri og nógvar og spennandi avbjóðingar liggja fyri framman. Nøgdirnar vaksa, og virkið skal útbyggjast og nýtímansgerast. Í tí sambandi søkja vit eftir einum evnagóðum virkisleiðara, sum hevur hegni til at leggja til rættis og leiða arbeiðið á virkinum.

Starvið er ein linjufunktión sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran. Hagreiðingarvirkið er sjálvstøðugt avkastsøki, og tí er neyðugt, at tú hevur evni til at skapa avkast bæði til virkið og kundan. Tú skalt hava førleika í innanhýsis roknskaparføring og skil fyri hagtølum.

**Útbúgving og royndir**
Vit sóknast eftir einum fólki við hægri útbúgving, so sum framleiðsluverkfrøðingi, matvøruverkfrøðingi ella líknandi. Tú hevur gjarna nakað av royndum frá almennu og/ella privatu vinnuni. Manglar tær royndirnar, men hevur áræði og dirvi til at gera tingini betri, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv. Skeivar arbeiðstíður kunnu koma fyri. Høvuðssætið er í Kollafirði, men arbeiðið fevnir um alt okkara virkisøki. Lønin er kappingarfør, og setanarviðurskifti verða avtalað í mun til tínar førleika og royndir.

**Umsóknin**
Umsókn við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. desember í ár.

Fleiri upplýsingar til starvið fáast við at venda sær til Frímund Hansen, stjóra. Skriva til frimund@vestlax.fo ella ring á tel 777 000

# LÆRLINGUR TIL SØLU- OG LOGISTIKKDEILDINA Á VESTSALMON

**Vit sóknast eftir einum dugnvaligum og virkisfúsum lærlingi til sølu og logistikkdeildina á Vestsalmon.**

Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. kundasamskifti bæði í Føroyum og uttanlands, at fakturera og avrokna fisk, at gera upp, at avgreiða ymisk útflutningsskjøl so sum toll-, heilsu- og djóralæknaskjøl. Harumframt alt fyrifallandi arbeiði á eini slíkari deild.

**Útbúgving og royndir**
Tú hevur handilsskúla, fiskivinnuskúla ella aðra viðkomandi miðnámsskúlaútbúgving. Tú hevur eisini evni at samskifta bæði málsliga og tøkniliga.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv. Skeivar arbeiðstíðir kunnu koma fyri. Høvuðssætið er í Kollafirði, men arbeiðið fevnir um alt okkara virkisøki. Løn sambært sáttmála, men hon kann tó verða hægri um tað verður mett hóskandi.

**Umsóknin**
Umsókn við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. desember í ár.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Boga Johannesen, leiðara fyri søludeildina. Skriva til bogi@vestlax.fo ella ring á tel 777 011

# LÆRLINGUR TIL FYRISITINGINA Á VESTSALMON

**Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum lærlingi til fyrisitingina á Vestsalmon.**

Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. bókhald, at gera roknskap upp, telefonavgreiðsla, at taka sær av posti. Harumframt alt fyrifallandi arbeiði á eini slíkari deild.

**Útbúgving og royndir**
Tú hevur handilsskúla, studentsprógv ella aðra viðkomandi miðnámsskúlaútbúgving. Tú hevur eisini evni at samskifta bæði málsliga og tøkniliga.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv. Skeivar arbeiðstíður kunnu koma fyri. Høvuðssætið er í Kollafirði, men arbeiðið fevnir um alt okkara virkisøki. Løn sambært sáttmála, men hon kann tó verða hægri um tað verður mett hóskandi.

**Umsóknin**
Umsókn við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. desember í ár.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oddmar A. Berg, leiðara fyri fyrisitingina. Skriva til oddmar@vestlax.fo ella ring á tel 777 003

**P/F VESTSALMON** : POSTBOX 82 : FO-410 KOLLAFJØRÐUR : FAROE ISLANDS : TEL +298 477 000 : FAX +298 477 001
VESTLAX@VESTLAX.FO : WWW.VESTSALMON.COM

VESTSALMON